Búskapur og vinna:

## Fegnast um uppskot

Danskir fiskimenn eru yvirhøvur fegnir um, at ES-nevndin loksins er komin við einum uppskoti um at nýskipa fiskivinnuna. Verður uppskotið samtykt í núverandi líki, fer tað at bera í sær, at einir 30.000 fiskimenn í ES-londunum noyðast at finna sær annað arbeiði. ES-nevndin sigur, at ovfisking er høvuðsorsøkin til, at fiskivinnan í nógvum londum er illa fyri, og at tað tí er neyðugt at skerja royndina munandi.

Men danskir fiskimenn halda ikki, at tað eru teir, sum eiga at skerja royndina. Teir vísa á, at nógv donsk skip eru upphøgd seinnu árini, og at tað heldur eru londini í Suðurevropa og fyrst og fremst Spania, sum eiga at skerja sín flota.

Men í donsku fiskivinnuni verður tankin um at høggja fleiri skip ikki vístur burtur. Næstformaðurin í danska fiskimannafelagnum, Hans Aa, sigur, at danir eru til reiðar at taka ein part av flotanum úr drift.

– Kunnu 70 prosent av verandi fiskimonnum varðveita sítt starv og liva væl av tí, kann vera, at vit kunnu taka undir við tí, sigur Hans Aa.

## Skulu stuðla alingini

Nú ES-nevndin hevur lagt fram uppskot um, hvussu fiskivinnan í samveldinum skal nýskipast, hevur hon eisini nakrar tankar um, hvussu alivinnan í ES-londunum kann mennast.

Í uppskotinum hjá nevndini stendur, at alivinnan má roknast sum eitt týðandi alternativ til ta vanligu fiskivinnuna, og nevndin mælt tí til, at ES stuðlar alivinnuni – ikki við fíggjarligum stuðuli, men við gransking og umhvørvisásetingum.

Donsku alararnir fegnast serliga um tað seinna, tí júst sær strongu donsku umhvørvisreglurnar hava forðað fyri, at alivinnan í Danmark hevur kunnað ment seg. Sum er ala danir 32.000 tons av feskvatnsfiski og 7.000 tons á sjónum.

UTTAN ÚR HEIMI

# Danir finnast at Ísrael



*Palestinar flýggja undan ísraelskum hermonnum í einum býi á Vestara Áarbakka. Nógvir palestinar sita í ísraelskum fongslum, og nú krevur Danmark, at fongsulsmyndugleikarnir halda altjóða reglurnar um rætindi hjá fangum*

**Danska stjórnin heldur, at ES eigur at mótmæla viðferðini, sum palestinskir fangar fáa í ísraelskum fongslum**

DANMARK
*Árni Joensen:*

Danska stjórnin, sum higartil hevur verið ógvuliga varin við at finnast at Ísrael í sambandi við kreppuna í Miðeystri, tykist nú hava broytt hugsan.

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri sigur í einum skrivtligum svari til undanmann sín, Mogens Lykketoft, at við støði í upplýsingum frá altjóða Reyða Krossi halda ísraelsku fongsulsmyndugleikarnar ikki altjóða galdandi reglur.

Mogens Lykketoft nevndi í sínum spurningi til uttanríkisráðharran Fatahleiðaran Marwan Barghouti, sum ísraelskir hermenn hava tikið, og sum nú situr í einum fongsli í Ísrael. Per Stig Møller sigur, at sambært Reyða Krossi hevur Ísrael brotið altjóða reglurnar í hesum føri. Víst verður á, at Fatahleiðarin er støðugt bundin um øklarnar, og tað er ikki loyvt sambært altjóða reglum.

– Støðan hjá stjórnini er, at Ísrael skal halda ásetingarnar í altjóða reglunum um rættindini hjá fangum, stendur í svarinum frá Per Stig Møller.

Uttanríkisráðharrin sigur, at stjórnin hevur virkað fyri, at ES skal taka eitt felags stig ímóti Ísrael fyri at fáa landið at geva palestinsku fangunum ta viðferð, sum altjóða reglur tryggja teimum.

Amnesty International hevur sagt, at Marwan Barghouti verður píndur í ísraelska fongslinum. Sagt verður, at hann sleppur ikki at sova, og at ísraelsku fangavørðarnir hava latið hann sita í einum stóli, sum seymir eru negldir í. Talsmaðurin hjá Reyða Krossi í Geneve vil ikki gera viðmerkingar til skuldsetingarnar hjá Amnesty International.

Ísraelski sendiharrin í Danmark, Carmi Gillon, vil heldur ikki gera nakrar viðmerkingar til atfinningarnar hjá donsku stjórnini.

# Avrættaður hóast fleiri mótmæli

**Gjáranáttina varð tann 25 ára gamli Napoleon Beazley avrættaður í einum fongsli í Texas hóast fleiri áheitanir og mótmæli**

Napoleon Beazley varð dømdur til deyða fyri eitt morð, sum hann framdi, tá hann var 17 ára gamal. Stutt fyri midnátt í fyrrakvøldið fekk hann eina eitursproytu í einum fongsli í Texas. Frammanundan hevði hann givið varðhaldsmonnunum eitt bræv, har hann bað um fyrigeving fyri, at hann myrdi ein oljumann í 1994.

Napoleon Beazley var svartur sum meginparturin av teimum, sum eru vorðin avrættað í amerikanskum fongslum, men tað var ikki orsøkin til, at amerukansku myndugleikarnir fingu serliga nógv mótmæli hesaferð. Fleiri túsund einstaklingar kring allan heimin sendu myndugleikunum mótmæli ímóti deyðadóminum, og tað sama gjørdu fleiri felagsskapir.

Orsøkin til tey mongu mótmælini er, at altjóða lóg bannar deyðarevsing ímóti fólki, sum vóru yngri enn 18 ár, tá tey framdu lógarbrotið. Orsøkin er, at ungfólk ofta eru óbúgvin og viðbrekin, og tí kunnu tey ikki altíð revsast fyri sínar gerðir.

USA og Somalia eru tey einastu londini, sum ikki hava staðfest altjóða lógina. Í fongslum í Texas sita tveir aðrir fangar og bíða eftir at verða avrættaðir, hóast teir vóru yngri enn 18 ár, tá teir framdu tað lógarbrotið, sum teir eru dømdir fyri.

Napoleon Beazley viðgekk í 1995, at hann hevði myrt tann hvíta oljumannin árið fyri. Tá var hann 17 ára gamal.

Úr Norðurlondum:

## Buss- og flogvanlukka

Seinnapartin týsdagin doyðu tvey fólk, tá eitt lítið flogfar datt niður har suðuri við jútsku vesturstrondina. Stutt eftir hendi ein bussvanlukka í Gedser, tá ein tvídekkaður svenskur bussur koyrdi seg fastan undir einum hálvtaki í havnini. Fýra fólk doyðu, og 18 máttu á sjúkrahús til viðgerðar.

Flogfarið, sum datt niður við oynna Rømø, var týskt, og tey bæði fólkini, sum doyðu, vóru eini eldri týsk hjún. Flogskiparin varð bjargaður. Enn er ikki greitt, hví vanlukkan hendi.

Tey fýra, sum doyðu í bussvanlukkuni í Gedser, vóru fólk úr Bosnia. Hálvtakið, sum tann tvídekkaði bussurin koyrdi inn undir, var ætlað persónbilum, og uttanfyri stóð, at tað var ikki ætlað bilum, sum eru hægri enn 3,3 metrar. Svenski bussurin var væl hægri enn tað, men kortini valdi svenski bussførarin at fara tann vegin.

Hetta er onnur vanlukkan við tvídekkaðum svenskum bussum í Danmark hetta seinasta árið. Fyrru ferð koyrdi ein bussur seg fastan undir Knippelsbrúnni í Keypmannahavn. Eisini tann vanlukkan kravdi fleiri mannalív.

## Aftur vakt við markið

Bert nakrar mánaðir eftir at tað vanliga eftirlitið á markinum millum Danmark og Týskland varð sett úr gildi, hevur danska stjórnin boðað frá, at eftirlitið verður aftur sett í gildi. Lene Espersen, løgmálaráðharri sigur, at tað er neyðugt at forða fyri, at útlendskir ófriðarkroppar koma til Danmarkar at skipa fyri ófriði í sambandi við ES-toppfundin, sum verður í Danmark í desember. Danmark hevur formansskapin í ES seinna hálvár í ár, og stjórnin ætlar at forða fyri, at tað, sum hendi í Gøteborg, skal endurtaka seg í Keypmannahavn. Tí skal løgreglan taka eftirlitið á markinum uppaftur.



# Á ferð í Parkini

*Ferðaleiðari á ferðini var Lars Masselback, og ikki kann sigast annað enn, at tað lá væl fyri hjá honum at siga frá*






*Klaksvíkingarnir forvitnaðust helst, um Todi kemur aftur til KÍ at spæla*

**Føroyska fótbóltsferðalagið, sum var til stórdystin millum FCK og Brøndby, slapp at kaga handan leiktjøldini á danska tjóðarleikvøllinum, og tað var ein undirhaldandi og upplýsandi ferð**

RUNDFERÐ
*Eyðun Klakstein og Jonhard Hammer*

Tað er tveir dagar áðrenn størsta fótbóltsdystin í Danmark í hesum árinum, og uttan fyri kaffistovuna á einum av hornunum á danska tjóðarleikvøllinum hoyrast føroyskt mál allastaðni.

Sólin skínur, og fólk hava sett seg við borðini í túninum uttan fyri kaffistovuna. Onkur leitar eisini innar í skuggan, har ein kvinna handa diskin vartrar upp við leskandi drykkjuvørum.

Eitt flogfar við føroyingum lendi dagin fyri á flogvøllinum í Kastrup, og hesaferð var talan fyrst og fremst um fólk, sum skuldu til Danmarkar at fylgja stórdystinum millum FC Keypmannhavn og Brøndby, sum eru mætastu fótbóltsfeløg í Danmark í løtuni.

Ein klaksvíkingar verður vónandi við á vøllinum, og eisini í føroyska ferðalagnum eru nógvir bygdamenn hjá fremsta føroyska fótbóltsspælaranum. Teir eru sum allir aðrir føroyingar ernir av avrikunum hjá honum.

Atlantsflog og Sosialurin, sum hava skipað fyri ferðini, geva hendan fríggjadagin fólki høvi at hyggja innar í Parkina, handan leiktjøldini og inn í tað allarheilagasta – skiftirúmini.

Og tað verður til eina undirhaldandi ferð, har eitt av starvsfólkunum frá kunningardeildini hjá FCK, skal vísa runt. Hann dugir væl at greiða frá, og við hvørt fær hann hjálp frá einum klaksvíkingi, sum heldur ikki er skorin fyri tungubandið.

### Ómøguligar stjørnur

Allir teir stívliga 41.000 sessirnir í Parkini eru tómir hendan sólskinsdagin, tá eitt ferðalag við umleið 50 føroyingum spákar inn á leikvøllin. Eingin sleppur inn á sjálvan grasvøllin, tí so verður enski gartnarin í øðini. Hann arbeiðir har fyri, at sjálvur vøllurin er góður at spæla á, og so ber ikki til at hava fólk rennandi á grøna grasinum.

Í skiftirúminum greiðir FCK-maðurin Lars frá, hvat plagar at ganga fyri seg har. Hann vísir føroyingunum, hvar teir ymsu donsku landsliðsspælararnir – bæði núverandi og fyrrverandi – hava síni pláss, og so sleppur Todi Jónsson at greiða frá, hvar hann plagar at skifta, og hvørjar spælarar hann hevur undir liðini á sær.

Á vegginum innar til massagubeinkim eru tvey smá merki í vegginum. Væl upplagdi Lars vil vera við, at har plagdi hárturkarin hjá Mark Strudal at hanga, tá hann spældi á landsliðnum. Strudal hevði langt hár og var ofta argaður við tí.

FCK-verturin greiðir eisini frá, at útlendskar tónleikstjørnur plaga at halda til í skiftirúminum, sum tá verður innrættað sum stova, tá tær hava konsert í Parkini. Ynskini frá teimum útlendsku tónleikarunum eru ymisk, alt frá eini ørgrynnu av whiskey, sum tá Rolling Stones vóru á vitjan, til serligt barnarúm, sum tá Whitney Houston hevði konsert har.

Júst Whitney Houston var púrasta ómøgulig at fáast við, tá hon var í Keypmannhavn, og kravdi millum annað eina limousinu fyri at verða koyrd til eina tyrlu, sum bíðaði nakrar hundrað metrar frá Parkini.

### Todi og pengarnir

Tá fótbóltsdystur er í Parkini, snýr tað seg um meira enn fótbólt. Tað snýr seg eisini um at selja pylsur og drykkjuvørur, og bilførarin hjá Føroya Bjór, sum er ein av klaksvíkingunum á rundferðini, er ovfarin, tá hann hoyrir, hvussu nógvir litrar av øli verða druknir undir einum dysti.

Føroyingarnir sleppa eisini at royna bleytu sessirnar í serligu losjunum, sum eru ætlaðar teimum, sum stuðla FCK á ymsan hátt. Har er gott at sita, og útsýnið út yvir vøllin er framúr.

– Hetta er sum at vera á Eiði, heldur áðurnevndi klaksvíkingurin fyri, tá hann hevur fingið afturpartin niður at.

Lars greiðir frá, hvussu fyritøkur sleppa fram at teimum fínu losjunum, og hvussu nógvar pengar, tær gjalda fyri sessirnar. Talan er um stórar upphæddir, men so hevur tú eisini atgongd til altjóða fótbólt frá nøkrum av bestu sessunum í Parkini.

– Um tit hava nakrar spurningar til mín ella til Toda, so eru tit vælkomin við teimum nú, sigur FCK-verturin.

So er ein tøgn eina løtu, til klaksvíkingurin heldur, at nú kann vera vell.

– Hvor meget fortjener Todi, spyr hann, og so rungar láturin í tómu Parkini.

Svarið er, sum tað kann væntast. Ongar ítøkiligar upplýsingar, og ístaðin fer FCK-umboðið at greiða frá takinum, sum kann dragast yvir Parkini, og tá eru góðir møguleikar fyri at hava risastór jólaborð í desember-kuldanum. Tað er nakað, sum gevur pengar í kassan, sigur hann.

Rundferðin er av, og føroyingarnir leita aftur til kaffistovuna í neðra. Har ber til at sessast eina løtu, áðrenn leiðin gongur innar í býin aftur. Tveir dagar seinni skal slagið standa, og tað verður ikki eins væl eydnað, sum rundferðin hendan dagin var.



*Todi greiddi frá, hvussu umstøðurnar í skiftingarrúminum eru*



*60 føroyingar vóru við á rundferðini í Parkini*